
Olju- og gassserfrøðingurin Alex Kemp heldur ikki at støðan í oljuvunnuni er so døpur sum nógv vilja hava tað til.

# Oljuserfrøðingur avvísir at leiting er við at steðga upp

**Jógvan Hugo Gardar**

20.12.2014 - 16:23

Oljan.fo

Olju- og gassserfrøðingurin Alex Kemp er ikki samdur við teimum sum óttast at oljuvinnan kann steðga upp í bretska partinum av Norðsjónum, nú oljuprísurin er so lágur.

LES EISINI: Stórabretland: Ongin nýggj oljuleiting við dagsins prísi

Leitivirksemið eftir olju og gass á bretska landgrunninum kann steðga, um oljuprísurin ikki hækkar. Robin Allan, nevndarformaður í Brindex, eitt felag fyri óheft leitifeløg í Stórabretlandi, sigur við BBC News at so at siga eingi nýggj leitiøkir á bretska landgrunninum fara at bera seg við einum oljuprísi sum liggur um, ella undir, 60 dollarar fatið.

Kemp sigur í samrøðu við Energy Voice at fleiri av oljubrunnunum sum eru boraðir eisini vóru spáddir ikki at bera seg við einum prísi um 90 dollarar fatið.

Hann sigur at tá prísurin lækkar skjótt, so kemur altíð ein steðgur í íløguhugin, eisini tá prísurin lá á 90 dollarum. Hann gevur tó Allan rætt fyri ein part.

- Íløguætlanir sum kosta 60-70 dollarar fatið at menna, tær koma ikki at bera seg. Harafturat er streymurin av íløgupengum eisini turkaður inn nú so lítið fæst fyri oljuna, sigur kemp.

Hann sigur at franmleiðslan á teimum økjunum har man í dag er í gongd við at framleiðs olja, hon heldur fram, men hugurin at byggja út nýggj økir, og at leita eftir olju, er minni nú.